Fíggjarmálaráðið

## Kommunalu fíggjarætlanirnar fyri 2010

Fíggjarætlanirnar hjá kommununum fyri 2010 eru nú samantaldar, og er heildarúrslitið hetta:

*Kommunalar fíggjarætlanir 2010 og 2009, samantaldar*

| § | (tús. Kr.) | 2010 | 2009 | %-broyting |
|---|---|---|---|---|
| §1-7 | Rakstur | 1.043.425 | 1.050.392 | -0,7% |
| | Íløgur | 331.643 | 348.538 | -4,8% |
| §20 | Rentuútreiðslur, netto | 55.828 | 45.819 | 21,8% |
| | Skattur v.m. | 1.337.509 | 1.370.635 | -2,4% |
| | **RLÚ-úrslit (undirskot)** | **-93.387** | **-74.114** | **26,0%** |

Úrslitið í fíggjarætlanunum fer sostatt frá undirskoti á 74 mió. kr. í 2009 til undirskot á 93 mió. kr. í 2010. Orsøkirnar til hetta er, at skattainntøkurnar minka við 33 mió kr. og at rentuútreiðslurnar vaksa við 9 mió. kr. Samstundis minka rakstur og íløgur, men ikki nóg mikið til at tálma skattainntøkuminkingini. Undirskotið verður í 2010 sambært innkomnu roknskapunum fíggjað við nettolántøku á 40 mió. kr. og minking í tøka gjaldførinum á 53 mió. kr.

Yvirskipað kann sigast, at gongdin seinastu árini vísir, at kommunurnar, tiknar undir einum, hækka útreiðslurnar í góðum tíðum og halda aftur í ringum tíðum. Gongdin í kommunalu fíggjarætlanunum 2010 er sostatt ein staðfesting av hesi gongd. Best hevði sjálvandi verið, um til hevði borið hjá tí almenna at hildið aftur í útreiðslunum í góðum tíðum, so at pláss hevði verið til útreiðsluøkingar í ringum tíðum, men tað tykist tortørt hjá tí almenna, bæði í føroyskum og alheims høpi, at fylgja tílíkum aðalreglum. Í verandi støðu er ávíst afturhald tí rætt og neyðugt, tá vigað verður millum atlit til virksemi mótvegis skuldarstøðu.

## Skattahækkingar í fleiri kommunum

M.a. tí at fleiri kommunur rokna við lægri inntøku í 2010, er skatturin settur upp í fleiri kommunum.

Hesar kommunur hava broytt skattin í 2010:

| Kommuna | Hækking(%) |
|---|---|
| Hvannasunds | 0,9 |
| Klaksvíkar | 0,5 |
| Eystur- | 1,0 |
| Eiðis | 1,0 |
| Sunda | 0,9 |
| Vestmanna | 1,0 |
| Vága | 0,5 |
| Sørvágs | 0,5 |
| Skopunar | 0,5 |
| Sumbiar | -1,0 |
| Tórshavnar | 1,0 |

Traðagøta 39 • Postsmoga 2039 • 165 Argir

Telefon 35 20 20 • Telefax 35 20 25 • E-mail: fmr@fmr.fo

Sumbiar kommuna er sostatt einasta kommuna, sum setir skattin niður í 2010. Tó setir Hvalbiar kommuna barnafrádráttin upp frá 3.000 kr. til 5.000 kr.

Í miðal hækkar kommunuskatturin 0,59% frá 2009 til 2010.

## Fleiri kommunur væntast at koma undir skuldarmarkið í 2010 – aðrar økja um skuldina

Hóast samlaða úrslitið er sum í talvuni omanfyri, so er ymiskt, hvussu einstøku kommunurnar raðfesta í 2010, og summar raðfesta útbygging og átaka sær harvið skuld, ímeðan kommunurnar, ið eru omanfyri skuldarmarkið á eina álíkning, yvirhøvur raðfesta at minka um skuldina.

Yvirhøvur er kommunala undirskotið í 2010 savnað hjá kommunum við góðari skuldarstøðu við tað, at hesar hildu aftur í útreiðslunum í góðu tíðunum, og sum nú nýta rúmdina í skuldarstøddini til at gera íløgur í skúlar, ellisheim og barnagarðar. Undirskotið í 2010 er sostatt sum heild savnað hjá Tórshavnar kommunu, Vága kommunu, Eysturkommunu og Sjóvar kommunu, ið allar eru væl fyri fíggjarliga. Aftaná íløgurnar í 2010 verða fleiri av hesum kommunum tó komnar so mikið nógv upp í skuld, at pláss ikki verður fyri størri íløgum í nøkur ár.

Kommunurnar, ið eru omanfyri skuldarmarkið á eina álíkning, raðfesta hinvegin sum heild at minka um skuldina. Um fíggjarætlanirnar fara at halda, kann sostatt roknast við, at Runavíkar, Sunda og Nes kommunur koma undir skuldarmarkið í 2010.

Hinvegin kemur Vestmanna kommuna uppum skuldarmarkið orsakað av bygging av ellisheimi. Hendan skuldarøkingin er heimilað av landsstýrismanninum í fíggjarmálum, ið tók undir við skuldarøkingini hjá kommununi fyri at tað skuldi bera til at fáa ellisheim í hesum landsøkinum.

Vágs kommuna hevur í nógv ár tikið tung tøk at minka um skuldina, og kom hon sostatt í 2009 undir skuldarmarkið á eina álíkning fyri fyrstu ferð í sera nógv ár. Vegna ellisheimsbyggingina, ið er byrjað í Vági, veksur skuldin hjá kommununi nú tó aftur, og er nettoskuldin í 2010 tí aftur omanfyri markið á eina álíkning.

## Kommunal roknskaparumlegging komið á mál

Fíggjarmálaráðið hevur saman við kommununum seinasta 1½ árið framt eina tað størstu roknskaparumlegging í Føroyum tey seinastu nógvu árini. Endamálið hevur verið at fáa størri samanberleika og opinleika í fíggjarligum viðurskiftum, bæði millum kommunur, men eisini millum land og kommunur. Sum heild er komið á mál við verkætlanini, og senda allar kommunur størri enn 400 íbúgvar nú mánaðarlig roknskapartøl til eina felags roknskaparskipan hjá Fíggjarmálaráðnum. Ætlanin er nú at byrja at tillaga skipanina, so at dagførdar roknskapardátur vera tøkar á internetinum fyri almenninginum hvønn mánað.